



Eisini føroysk umboð vóru á móttøkuni í Keypmannahavn (f.v) Ann Leivsgard Hendriksen frá Karin'sa, Kristin Bjørk Tungá frá Kvilt Hárfríðkan, Katrin Olsen frá Salong Katrin á Toftum, Rúni og Lív Lindberg frá Kvilt Hárfríðkan.



Øll framførslan luktaði av luksus við flottum showið, vøkrum modellum blandað við meditativan tónleik og vill sjónbandaklipp.



Tað eitt sindur villa Bed Head lookið var eisini víst fram á catwalkinum



Umframt at fáa hárið at síggja slætt og sunt út, kann S-Factor eisini brúkast til at størri og ógvusligari hár sum hetta

# LUKSUS TIL ØLL SLØG AV HÁRI

S-Factor kemur á føroyska marknaðin í komandi viku. Lív Lindberg, ið er frisør og umboð fyri TIGI, sigur at hon gleðir seg til at sleppa at brúka, vøruna, ið er tann besta hon hevur roynt.

**Niels Uni Dam, nielsuni@sosialurin.fo**

S-Factor er ein luksus linja til hárviðgerð. Hetta er nýggjasta linjan hjá TIGI, ið frammanundan er serliga kent fyri tí trendy Bed Head linjuna og klassisku Catwalk linjuna. Sambært TIGI undirstjóran Nick Irwin hevur skapandi deildin hjá TIGI arbeitt við S-Factor seinastu 7-8 árini, og úrslitið er ein luksus linja, ið riggar til øll sløg av hári.
Hetta eru dýrar vørur, men eisini vørur, ið veruliga forkela hárið, greiddi Irwin frá á móttøkuni í Dansk Design Center. S-Factor arbeiðir við at endurvinna natúrliga glansin og sunnu útsjóndina í hárinum, ið øll ynskja sær.

Tá vit prátaðu við Lív Lindberg úr Kvilt hárfríðkan nakrar dagar aftan á móttøkuna, hevði hon roynt nýggju vørurnar bæði til sín sjálvs og á onnur, og hon var sera væl nøgd við úrslitið. "Hetta er ein luksusvøra" greiddi hon frá, og segði, at hetta var uttan iva tað besta, ið hon hevði arbeitt við. "Hetta er kvalitetur og fær hárið at síggja blankt og sunt út. Flestu kvinnir lita hárið, og hetta slítur hárið. Tað er eingin, ið dámar at hava hár, ið sær slitið út. Tí er hetta ein vøra sum vit veruliga kunnu brúka", greiddi hon frá.

Lív segði, at hon merkir ein vaksandi áhuga millum vanlig fólk fyri at keypa hárfríðkanar vørur í salongini. Prísurin er væl hægri enn fyri vørur, ið tú keypir í matvøruhandlunum, men góðskan er eisini ein heilt onnur.

Hetta er ikki ein avloysari til Bed Head og Catwalk leggur Lív dent á. Hetta er ein onnur vøra, ein vøra, ið nøktar nakrar aðrar tørvir. Hetta gevur TIGI merkinum enn meira breidd, og er væl egnað til hármótan í dag.

Hóast Lív fekk nakrar royndir við heim úr Danmark, so verður fyrsta sendingin av S-Factor ikki í Føroyum fyrr enn í komandi viku. Men Lív sigur, at hetta uttan iva eru vørur, ið tey fara at brúka í síni salong og sigur, at hon eisini gleðir seg til at sleppa at brúka vørurnar.

Kvilt er umboð fyri TIGI linjuna, og selur vørurnar til 9 salongir kring Føroyar.

Fleiri av vørunum í S-Factor linjuni eru beinleiðis gjørdar til at slætta langt hár og geva tí natúrliga og sunna útsjónd.

